Sólfríð Gregersen

Trúgvandi og samkynd

# TIT EIGA LÍVIÐ Í MÆR



– Eg lesi í skriftini og biðji til Harran hvønn dag. Men tað hevur verið trupult at hildið fast í trúnni, tá ið sama trúgv verður brúkt til at siga mær, at eg eri skeiv, sigur Sólfríð Gregersen, sum tók orðið í Reinsarínum fríggjakvøldið og tók øll á bóli

BARBARA HOLM

Tað var ein kensluborin løta í Reinsarínum fríggjakvøldið, tá ið LGBT'arar og viðhaldsfólk teirra hátíðarhildu, at áralanga stríðið um javnstøðu millum hinskynd og samkynd umsíður var komið at enda. Hjúnabandslógin varð broytt við 3. Viðgerð í Løgtinginum og LGBT nýtti høvið at bjóða inn til brúðarhús við køkum, tónleiki, røður og øðrum í pyntaðu hølunum í Tórsgøtu.

Fagnaðurin var stórur, røðurnar kenslubornar og tónleikurin hjartaligur. Men eingin løta var so hjartalig, sum tá unga gøtukvinnan Sólfríð Gregersen tók orðið.

»Tit eiga lívið í mær«, segði skjótt 21 ára gamla kvinnan og greiddi frá sínum lívið sum samkyndur, trúgvandi føroyingur. »Kann man tað«, spurdi hon sjálv frá pallinum, tá stundaði móti midnátt. Og hon svaraði sjálv »tað kann man væl«. Men tað hevur ikki altíð verið eins lætt. Fyri mong hevur hjúnabandslógin verður grundarlag fyri uppøstum kjakið, fyri spennandi politiskum taktikki, fyri grundleggjandi filisofiskum tankavirksemi. Men fyri Sólfríð hevur broytingin í hjúnabandslógini eina sera einfalda og altavgerandi avleiðing. Hon eigur lívið í henni.



Sólfríð Gregersen

PRIVATMYND

> »Eg kann ikki ímynda mær, at eg hevði orkað at liva soleiðis so langa tíð aftrat. Tí sigi eg, at tey hava bjargað mær«



– Tað hevur alt at siga. Endeliga kann eg síggja eina framtíð fyri mær í Føroyum. Endeliga kann eg sleppa at liva soleiðis, sum eg altíð havi ynskt mær, greiðir Sólfríð Gregersen frá.

Fríggjakvøldið var av álvara ein fagnaðardagur fyri Sólfríð. Men vegurin hartil hevur verið tungur.

### Vildi taka lívið av mær

Tú kundi ivaleyst hoyrt eina nál raka gólvið tað løtuna í Reinsarínum, tá ið Sólfríð Gregersen greiddi frá, at hon fleiri ferðir hevur roynt at tikið lívið av sær. Orsøkin kann neyvan lýsast í øllum sínum kompleksiteti, men ein partur av orsøkini er, at Sólfríð síðani 11 ára aldur hevur havt tunglyndi.

– Tað gekk upp fyri mær tá eg var 9-10 ár, at har var okkurt øðvísi við mær. Eg havi nokk altíð vitað tað innast ikki, men tá gekk tað upp fyri mær, hvussu øðrvísi eg var, greiðir Sólfríð Gregersen frá.

Men fyri Sólfríð var tað alt annað enn ein ynskistøða, tí hon visti, at Bíblian talaði ímóti samkyndleika.

– Eg visti jú væl, at tað er skeivt at vera tað eg eri, tí tað stóð í Bíbliuni. Og tann kenslan útvikladi seg til sjálvshatur rímiliga skjótt, greiðir Sólfríð Gregersen frá.

Sólfríð royndi av øllum alvi at broyta seg. Í rúma tíð royndi hon at hugsa um dreingir soleiðis, sum hon hugsaði um gentur. Hon royndi at gerast hinskynd.

– Eg fall í eina djúpa grøv av tunglyndi sum eg uppá mangar mátar stríðist við enn. Eg gjørdi ótrygg við meg sjálva og hataði tað, sum eg var, sigur Sólfríð Gregersen.

Men fyri Sólfríð hevur trúgvin verið ein dyggur stuðul, hóast sama trúgv eisini hevur verið brúkt ímóti ungu kvinnuni.

### Trúgvandi á netinum

Júst orsaka av, at kristindómur og samkyndleiki neyvan ganga hond í hond í Føroyum, hevur Sólfríð Gregersen havt trupult við at finna eina samkomu, har hon kennir seg vælkomna og trygga. Men umvegis LGBT hevur hon funnið samkomur á netinum fyri kristnir LGBT'arar, og har hevur hon funnið kærkomna hjálp.

– Trúgvin hevur ótrúliga nógv at siga fyri meg, men eg havi enn ikki funnið eina samkomu í Føroyum, har eg føli meg heima. Eg vóni tó at finna tað, sigur Sólfríð Gregersen.



Myndir frá »Brúðarhúsinum« hjá LGBT, sum varð hildið í Reinsaríðnum í Havn fríggjakvøldið 29. apríl 2016

MYNDIR: BIRGITH LASSEN











Á netinum fann hon Queer Theologi – eitt savningarstað fyri trúgvandi, lgbt'arar, sum hava trøv á at fáa stuðul so ella so.

– Har hava tey ótrúliga nógvar góðar stuðulsmøguleikar, og tey hjálpa tær at samansjóða tað samkynda lívið við tað kristna lívið, sigur Sólfríð Gregersen.

Fyri hana hevur tað verið trupult at halda fast í trúnni, tá ið trúgvin er brúkt ímóti henni og hennara líkum seinastu mongu árini. Men Sólfríð minnir seg sjálva á, at øll fólk kunnu bera tað ringa og tað góða fram.

– Eitt líknilsi er úr Bibliuni um tey góðu trøini og tað góðu fruktina harav. Hesi fólkini í Føroyum, sum fáa LGBT'arar at hata seg sjálvan, bera ikki nakra góða frukt. Tað kann ongantíð vera gott, at tey fáa onnur menniskju at kenna seg so illa, sigur Sólfríð Gregersen.

## Tey sterku eiga æruna

Sólfríð Gregersen er í dag takksom. Fyri hana hevur broytingin í hjúnabandslógini avgerandi týdning. Fyri hana merkir tað, at lívið kann livast her heima í Føroyum. Hon sleppur tí undan tí, sum til dømis Meinhard St.John, sum samrøða er við aðrastaðni í blaðnum, gjørdi tá hann var ungur. At rýma av landinum fyri at vera trúgvur móti sær sjálvum. Hon kann nú vera trúgv móti sær sjálvum heima í Syðrugøtu.

– Uttan sterk fólk sum Sonju Jógvansdóttir og Eiler Fagraklett, sum hava staðið á odda í hesum stríðnum, hevði tað kanska tikið eini 10-20 ár aftrat at fingið hetta ígjøgnum. Og eg kann ikki ímynda mær, at eg hevði orkað at liva soleiðis so langa tíð aftrat. Tí sigi eg, at tey hava bjargað mær, sigur Sólfríð Gregersen.

Hon leggur aftrat, at hon vil fegin siga nakað við fólk í somu støðu sum hon.

– Eg vil bara siga, at um onkur annar situr og berjist við at vera LGBT'ari og kennir tað sum, at tey eru óynskt, so skulu tey minnast til, at Gud elskar teg og hann hevur gjørt teg sum tú ert. Tað er einki galið við tær, sigur Sólfríð Gregersen at enda.